

*Higartil hava allir leiðararnir á sjómansheiminum í Reykjavík verið sandoyingar. Nú situr ein klaksvíkingur við róðurpinnin. Tað er fyrrverandi leiðarin á Vaktar- og Bjargingartænastuni, Jóan Karl Høgnesen, sum herfyri loysti Símun Hansen úr Skopun av*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Frá sjóverjuni til sjómansheim

**Sum yvirmaður í donsku sjóverjuni í mong ár, skal Jóan Karl Høgnesen nú royna seg sum leiðara á einum sjómansheimi. Síðst í apríl flutti hann inn á Ørkina í Reykjavík, sum hann skal standa á odda fyri komandi tvey árini**

## Útisetalív

**Kári Mikkelsen**
karim@sosialurin.fo

Hóast sjómansheim bæði í Føroyum og aðrastaðni eru stongd ella seld, eru útlitini hjá føroyska sjómansheiminum í Reykjavík, Ørkini, rættiliga góð. Tað heldur nýggi leiðarin, Jóan Karl Høgenesen úr Klaksvík, sum tók við starvinum fyri hálvum øðrum mánaða síðani, eftir at hava siglt næstan alt sítt lív, harav størsta partin í donsku sjóverjuni.

Sosialurin var á gátt á Ørkini í síðsta mánaða, har vit hittu nýggja leiðaran, sum tá bert hevði verið í starvi í tvær vikur.

Spurdur um, hví hann sókti starvið, sigur Jóan Karl Høgnesen:

Tað gjørdi eg tí, at eg eri komin nógv á sjómansheimið her og aðrastaðni, og annars havi verið nógv í Reykjavík og dámi væl býin. Hetta er eitt gott stað, sum er ein savningsdepil fyri føroyingar og hevur í veruleikanum virkað sum ein óalmenn føroysk sendistova. Tá eg so fór frá við eftirløn fyri einum hálvum ári síðani, og hetta starvið var lýst, helt eg tað vera upplagt at søkja tað, sigur Jóan Karl Høgnesen.

Hann vísir á, at sjómansheimið í stóran mun virkar sum eitt vanligt 3-stjørnað hotell, sum eisini útlendsk ferðafólk bíleggja seg inn á, eins og íslendingar og føroyingar, ið koma til Reykjavíkar.

Uppgávurnar hjá leiðaranum, sum í løtuni hevur fýra fólk afturat sær, eru ymiskar. Leiðarin ivast ikki í, at tað framvegis er ein tørvur á at hava eitt sjómansheim í Reykjavík, sjálvt um strukturin í sjómans- og fiskivinnuni er sera nógv broyttur seinnu árini, og at tað tí ikki longur er brúk fyri sjómansheimum í sama mun sum fyrr. Til dømis koma fiskiskipini ikki so oftani inn í fremmandar havnir longur, meðan farmaskipini gera ógvuliga skjótt av, tá tey eru í havn.

Harafturat er komforturin umborð á skipunum munandi betri í dag, enn hann nakrantíð hevur verið, og tí hava manningarnar ikki á sama hátt fyri neyðini at leita sær upp betri fysiskar umstøður, tá tær eru í landi. Eisini er frítíðin umborð minni, meðan manningarnar ístaðin eru oftari og longri heima, enn fyrr, so heimlongsulin spælir helst ikki inn í sama mun.

*– Hvat metir tú sum tína høvuðsuppgávu sum leiðari á Ørkini?*

Her eru nógvar uppgávur og eisini uppgávur, sum kanska ongin hugsar um. Tað verður spurt um alt møguligt. Hetta er eitt sjómansheim, sum byggir



*Sjómansheimið í Reykjavík, Ørkinn, sum er eitt trý-stjørnað gistingarhús, liggur tætt við sjálvt hjartað á íslendska høvuðsstaðnum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*